# Løgmansskrivstovan

Dagfesting: 10.08.2022
Mál nr.: 22/14559
Málsviðgjørt: NF

**Fylgiskjal 1**

**Javntekstur**

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

| Galdandi orðingar | Løgtingslógaruppskotið |
|---|---|
| | *Arbeiðsloysis- og barsilsmál*<br><br>**§ 1**<br><br>Í løgtingslóg nr. 113 frá 13. juni 1997 um arbeiðsloysistrygging og arbeiðsávísing (ALS-lógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 177 frá 17. desember 2020, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 26.** Avgerðir, sum Arbeiðsloysisskipanin hevur tikið viðvíkjandi arbeiðsloysi, kunnu kærast til kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina. Avgerðir hjá kærunevndini kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika, men kunnu skjótast inn fyri Føroya Rætt. Freistin hjá Arbeiðsloysisskipanini at skjóta mál inn fyri Føroya Rætt er innan 6 mánaðir eru farnir frá, at Arbeiðsloysisskipanin er kunnað um avgerðina. | **1.** Í § 26, stk. 1, 1. pkt. verður “kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini” broytt til: “Føroya Kærustovn”.<br><br>**2.** Í § 26, stk. 1, 2. pkt. verður “kærunevndini” broytt til: “Føroya Kærustovni”. |

| | |
|---|---|
| *Stk. 2.* Ummæli frá arbeiðsloysisskipanini til kærunevndina skal verða avgreitt innan 4 vikur. Kærunevndin kann í serligum førum leingja freistina at geva ummæli.<br>*Stk. 3.* Kærunevndin hevur 3 limir, ein umboðandi løntakarar, ein umboðandi arbeiðsgevarar og ein formann, ið skal vera løgfrøðingur. Limirnir verða valdir av landsstýrinum fyri 4 ár í senn, tó so at nevndarlimur verður sitandi til nýggjur er valdir.<br>*Stk. 4.* Samstundis verða vald varafólk, sum taka sæti í nevndini, tá limi berst frá. | **3.** Í § 26, stk. 2 verður í 1. pkt. “kærunevndina” broytt til: “Føroya Kærustovn” og í 2. pkt. verður “Kærunevndin” broytt til: Føroya Kærustovnur”.<br><br>**4.** § 26, stk. 3 og 4 verður strikað. |
| | **§ 2**<br><br>Í løgtingslóg nr. 48 frá 3. apríl 2001 um barsilsskipan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 174 frá 21. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 25 a.** Avgerðir eftir hesi løgtingslóg ella eftir reglum, settum sbrt. løgtingslógini, kunnu kærast til kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðanina um avgerðina. Avgerðir hjá kærunevndini kunnu ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika, men kunnu skjótast inn fyri Føroya Rætt. Freistin hjá landsstýrismanninum ella umsitingarmyndugleikanum sbrt. § 25 at skjóta mál inn fyri Føroya Rætt er, innan 6 mánaðir eru farnir, frá at landsstýrismaðurin ella umsitingarmyndugleikin er kunnaður um avgerðina.<br>*Stk. 2.* Ummæli frá landsstýrismanninum ella umsitingarmyndugleikanum til kærunevndina skal vera avgreitt innan 4 vikur. Kærunevndin kann í serligum førum leingja freistina at geva ummæli.<br>*Stk. 3.* Kærunevndin hevur 3 limir, ein umboðandi løntakarar, ein umboðandi arbeiðsgevarar og ein formann, ið skal vera løgfrøðingur. Limirnir verða valdir av landsstýrismanninum fyri 4 ár í senn, tó so at nevndarlimur verður sitandi, til nýggjur er valdur. | **1.** Í § 25 a, stk. 1, 1. pkt. verður “kærunevndina hjá Arbeiðsloysisskipanini og Barsilsskipanini” broytt til: “Føroya Kærustovn”.<br><br>**2.** Í § 25 a, stk. 1, 2. pkt. verður “kærunevndini” broytt til: “Føroya Kærustovni”.<br><br>**3.** Í § 25 a, stk. 2 verður í 1. pkt. “kærunevndina” broytt til: “Føroya Kærustovn” og í 2. pkt. verður “Kærunevndin” broytt til: Føroya Kærustovnur”.<br><br>**4.** § 25 a, stk. 3-5 verður strikað. |

| | |
|---|---|
| *Stk. 4.* Samstundis verða vald varafólk, sum taka sæti í nevndini, tá limi berst frá.<br>*Stk. 5.* Nevndarlimir og varalimir fáa samsýning, sum landsstýrismaðurin ásetur. | |
| | *Høvuðsbarnaverndarmál*<br><br>**§ 3**<br><br>Í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar: |
| *Høvuðsbarnaverndarnevndin*<br><br>**§ 11.** Landsstýrismaðurin setur eina Høvuðsbarnaverndarnevnd til at taka avgerð í málum, har samtykki ikki er fingið frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan, og einum barni, ið hevur fylt 15 ár, tó undantikið § 15, stk. 2, § 17, stk. 1, § 18, stk. 1 og § 20, stk. 1.<br>*Stk. 2.-3.* ... | **1.** Yvirskriftin yvir § 11 verður orðað soleiðis:<br>*"Høvuðsbarnaverndarmál"*<br><br>**2.** Í § 11, stk. 1 verður "Landsstýrismaðurin setur eina Høvuðsbarnaverndarnevnd til at taka" broytt til: "Føroya Kærustovnur tekur". |
| | **3.** Í § 11, stk. 2, § 15 a, stk. 1 og 2, § 15 b, stk. 2, § 19, stk. 1, § 22, stk. 2-3, tvær staðni í stk. 4 og í stk. 5-7, § 23, stk. 1, § 24, tvær staðni í stk. 2 og tvær staðni í stk. 3, § 24 a, stk. 1-5, § 24 b, stk. 3, § 24 f, tvær staðni í stk. 1, § 35, stk. 1, 2. pkt. og stk. 2, § 37, stk. 1-3, § 55, stk. 1 og 2, § 56, § 57, stk. 3 og 5, § 63 a, stk. 5, § 71, stk. 1 og § 74, stk. 2 verður "Høvuðsbarnaverndarnevndin" broytt til: "Føroya Kærustovnur". |
| | **4.** Í § 11, stk. 3, § 17, stk. 3, § 18, stk. 3, § 20, stk. 3, § 24, stk. 1, § 24 a, stk. 4, § 24 b, stk. 2, § 24 d, stk. 3, § 43, stk. 1, § 52, stk. 1-6 og § 54, stk. 1 verður "Høvuðsbarnaverndarnevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn". |

| | |
|---|---|
| **§ 12.** Í Høvuðsbarnaverndarnevndini skulu vera 3 limir: Ein royndur løgfrøðingur, ið er formaður í nevndini, ein sálarfrøðingur og ein barnasakkønur.<br>*Stk. 2.* Harumframt velur landsstýrismaðurin 3 varalimir, sum skulu vera: Ein royndur løgfrøðingur, ein sálarfrøðingur og ein barnasakkønur.<br>*Stk. 3.* Limir og varalimir verða valdir fyri 4 ár í senn. Kommunustýrislimir, løgtingslimir og limir ella starvsfólk í barnaverndartænastum kunnu ikki taka sæti í Høvuðsbarnaverndarnevndini.<br>*Stk. 4.* Í teimum førum, har ein limur og varalimur hansara eru ógegnigir, skal formaðurin í nevndini taka avgerð um, at ein annar persónur, við sama førleika sum viðkomandi limur ella varalimur, tekur sæti í Høvuðsbarnaverndarnevndini í einum ávísum máli.<br>*Stk. 5.* Nevndarlimirnir fáa løn ella samsýning, sum landsstýrismaðurin ásetur. | **5.** § 12 verður strikað. |
| | **6.** Í § 24 a, stk. 1 og 2, § 24 b, stk. 1, § 24 d, stk. 1, § 35, stk. 1, 1. pkt. og stk. 3, § 52, stk. 4 og 6, § 64, stk. 1 og § 74, stk. 1 og 2 verður Høvuðsbarnaverndarnevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni", |
| **§ 24 b.** ...<br>*Stk. 3.* Høvuðsbarnaverndarnevndin kann tó nokta fyri, at málið verður viðgjørt av nýggjum, um málið teir seinastu 12 mánaðirnar hevur verið viðgjørt av hesi nevnd. | **7.** Í § 24 b, stk. 3 verður "hesi nevnd" broytt til: Føroya Kærustovni". |
| **§ 51.** Øll, sum útinna tænastu ella arbeiði fyri eina fyrisiting ella stovn eftir hesi lóg ella eru limir í eini barnaverndarnevnd, Høvuðsbarnaverndarnevndini ella kærunevndum, hava tagnarskyldu sambært kapitli 8 í fyrisitingarlógini um tagnarskyldu v.m.<br>*Stk. 2-4.* ... | **8.** § 51, stk. 1 verður orðað soleiðis:<br>"Øll, sum útinna tænastu ella arbeiði fyri eina fyrisiting ella stovn eftir hesi løgtingslóg, fyri Føroya Kærustovn ella eru limir í eini barnaverndarnevnd, hava tagnarskyldu sambært kapitli 8 í fyrisitingarlógini um tagnarskyldu v.m." |

| | |
|---|---|
| **Kapittul 8**<br>**Málsviðgerðarreglur fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina** | **9.** Í yvirskriftini til kapittul 8 verður "**Høvuðsbarnaverndarnevndina"** broytt til: "**Høvuðsbarnaverndarmál**". |
| *Ógegni*<br><br>**§ 53.** Reglurnar í kapitli 2 í Fyrisitingarlógini um ógegni galda fyri limir og varalimir í Høvuðsbarnaverndarnevndini. | **10.** Yvirskriftin yvir § 53 og § 53 verður strikað. |
| **§ 55.** ...<br>*Stk. 3.* Formaðurin í Høvuðsbarnaverndarnevndini kann avgera, at málið verður avgjørt uttan ein samráðingarfund, um partarnir eru samdir um tað. | **11.** Í § 55, stk. 3 verður "Formaðurin í Høvuðsbarnaverndarnevndini" broytt til: "Føroya Kærustovnur". |
| **§ 57.** ...<br>*Stk. 3.* Um Høvuðsbarnaverndarnevndin metir, at tað gagnar málinum, kann nevndin avgera, at foreldur og børn, ið eru partar í málinum, fáa ókeypis umboðan í málum viðvíkjandi umsorganaryvirtøku, har samtykki er fingið frá tí ella teimum, ið hava foreldramyndugleikan.<br>*Stk. 4.* …<br>*Stk. 5.* Høvuðsbarnaverndarnevndin kann tilnevna ein talsmann fyri barnið í málum, sum verða viðgjørd í nevndini. | **12.** Í § 57, stk. 3 verður "nevndin" broytt til: "Føroya Kærustovnur", og í stk. 5 verður "nevndini" broytt til: "Føroya Kærustovni". |
| **§ 69.** Landið heldur útreiðslurnar fyri stovnsetan og rakstur av Høvuðsbarnaverndarnevndini og fyri stovnsetan og rakstur av samdøgursstovnum, herundir familjuviðgerð á samdøgursstovnum, fyri stovnsetan og rakstur av dagstovnum hjá landinum, sambært § 33, stk. 2, fyri stovnspláss uttanlands, sambært § 35, stk. 2 og harumframt fyri útreiðslur í sambandi við ókeypis umboðan, sambært § 57.<br>*Stk. 2.* … | **13.** Í § 69, stk. 1 verður "fyri stovnsetan og rakstur av Høvuðsbarnaverndarnevndini og" strikað. |

| | |
|---|---|
| | **§ 4**<br><br>Í løgtingslóg nr. 42 frá 30. apríl 2018 um ættleiðing (Ættleiðingarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 10.** Ættleiðingarloyvi kann latast, hóast samtykki, ið er givið sbrt. § 9, verður afturtikið, um afturtøkan ikki er rímiliga grundað við atliti til barnsins besta.<br>*Stk. 2.* Hóast tað ikki er møguligt at fáa samtykki sbrt. § 8, stk. 1, kann ættleiðingarloyvi í heilt serligum førum latast, um atlitið til barnsins besta avgerandi talar fyri hesum. Er barnið umsorganaryvirtikið, krevst samtykki frá Høvuðsbarnaverndarnevndini.<br><br>**§ 11.** Familjufyrisitingin kann eftir áheitan frá Høvuðsbarnaverndarnevndini loyva, at eitt barn, sum er umsorganaryvirtikið, seinni verður burturættleitt, hóast samtykki sbrt. § 8 ikki verður fingið til vega. Loyvi kann bert latast sambært treytunum í § 10, stk. 2. | **1.** Í § 10, stk. 2 og § 11 verður “Høvuðsbarnaverndarnevndini” broytt til: “Føroya Kærustovni”. |
| **§ 13.** Hevur Familjufyrisitingin gjørt av at síggja burtur frá, at samtykki til ættleiðing ikki er fingið til vega, og barnið býr hjá tí, ið søkir um ættleiðing, kann foreldramyndugleikaánarin ikki taka barnið úr heiminum hjá umsøkjaranum, meðan málið um ættleiðing verður viðgjørt. Tað sama ger seg galdandi, um Høvuðsbarnaverndarnevndin hevur givið samtykki sbrt. § 10, stk. 2, 2. pkt., ella um umbøn er sett fram sbrt. § 11. | **2.** Í § 13 verður “Høvuðsbarnaverndarnevndin” broytt til: “Føroya Kærustovnur”. |
| | *Tvingsilsmál innan almannaøkið*<br><br>**§ 5**<br><br>Í  løgtingslóg nr. 73 frá 25. mai 2020 um tvingsil og onnur inntriv í |

| | |
|---|---|
| | sjálvsavgerðarrættin verða gjørdar hesar broytingar: |
| | **1.** Í § 3, stk. 3, § 8, stk. 2, § 28, stk. 6 og § 30, stk. 1, 1. pkt. verður "tvingsilsnevndini" broytt til: "Føroya Kærustovn". |
| *Tvingsilsnevndin*<br><br>**§ 4.** … | **2.** Yvirskriftin yvir § 4 verður orðað soleiðis:<br>"*Tvingsilsmál*" |
| **§ 4.** Landsstýrismaðurin setir eina nevnd í málum um tvingsil at taka avgerð um góðkenning av inntrivi sambært hesi løgtingslóg og góðkenning sambært § 51, samanber § 50, í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Avgerð um góðkenning verður framd við støði í tilmæli sambært § 24 í hesi løgtingslóg og § 51 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Harumframt tekur nevndin avgerð í kærumáli sambært § 30. Eisini tekur nevndin avgerð um gildistíð á inntrivi, samanber § 29.<br>*Stk. 2.* Tvingsilsnevndin er samansett við einum føstum nevndarlimi og fleiri serkønum nevndarlimum. Landsstýrismaðurin tilnevnir fasta nevndarlimin, ið er formaður, og serkønu nevndarlimirnar. Fasti nevndarlimurin skal vera royndur løgfrøðingur. Serkønu nevndarlimirnir verða valdir millum persónar, ið eru serkønir innan sosialnámsfrøði, heilsurøkt, sjúkrarøkt, sálarfrøði og sálarsjúkufrøði. Landsstýrismaðurin velur 1 varalim fyri fasta nevndarlimin. Varalimurin skal vera royndur løgfrøðingur.<br>*Stk. 3.* Tá nevndin tekur avgerð, luttaka formaðurin og tveir serkønir nevndarlimir. Formaðurin ger av, hvørjir av serkønu nevndarlimunum skulu luttaka í nevndarviðgerðini. Í serligum førum kann formaðurin gera av, at fleiri enn tveir serkønir nevndarlimir luttaka í nevndarviðgerðini. | **3.** § 4 verður orðað soleiðis:<br>"**§ 4.** Føroya Kærustovnur tekur avgerð um góðkenning av inntrivi sambært hesi løgtingslóg og góðkenning sambært § 51, samanber § 50, í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Avgerð um góðkenning verður framd við støði í tilmæli sambært § 24 í hesi løgtingslóg og § 51 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur. Harumframt tekur Føroya Kærustovnur avgerð í kærumáli sambært § 30. Eisini tekur Føroya Kærustovnur avgerð um gildistíð á inntrivi, samanber § 29.<br>*Stk. 2.* Í málum viðvíkjandi §§ 10, 13, 14 og 25 og kapitlunum 4 og 5 skal avgerðin hjá Føroya Kærustovni vera tikin skjótast gjørligt og í seinasta lagi 14 dagar eftir, at tilmælið sambært § 24 er móttikið.<br>*Stk. 3.* Í øðrum málum skal skal avgerðin hjá Føroya Kærustovni vera tikin í seinasta lagi 30 dagar eftir, at tilmæli sambært § 24, kæra sambært § 24, stk. 4 ella tilmæli sambært § 51 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur er móttikið. Er avgerð ikki tikin innan nevndu freist, skal avgerðin verða tikin skjótast gjørligt, og orsøkin fráboðast myndugleikanum og avvarðandi pørtum.<br>*Stk. 4.* Føroya Kærustovnur førir yvirlit yvir avgerðir um góðkenning, móttiknar fráboðanir og frágreiðingar sambært |

| | |
|---|---|
| *Stk. 4.* Tvingsilsnevndin kann leita sær aðra serkøna hjálp til at stuðla undir nevndarviðgerðina.<br>*Stk. 5.* Avgerðir í tvingsilsnevndini verða tiknar við vanligum atkvøðumeiriluta. Stendur á jøvnum, er formansins atkvøða avgerandi.<br>*Stk. 6.* Tvingsilsnevndin skal eftir áheitan ella kann av sínum eintingum geva myndugleikanum, persóninum, advokati hansara ella avvarðandi høvi til munnliga ella skrivliga at bera fram sjónarmið ella at lýsa evni gjøllari.<br>*Stk. 7.* Í málum viðv. §§ 10, 13, 14 og 25 og kapitlunum 4 og 5 skal avgerð nevndarinnar vera tikin skjótast gjørligt og í seinasta lagi 14 dagar eftir, at tilmælið sambært § 24 er móttikið.<br>*Stk. 8.* Í øðrum málum skal avgerð nevndarinnar vera tikin í seinasta lagi 30 dagar eftir, at tilmæli sambært § 24, kæra sambært § 24, stk. 4 ella tilmæli sambært § 51 í løgtingslóg um almannatrygd og tænastur er móttikið. Er avgerð ikki tikin innan nevndu freist, skal avgerðin verða tikin skjótast gjørligt, og orsøkin fráboðast myndugleikanum og avvarðandi pørtum.<br>*Stk. 9.* Fasti nevndarlimurin, varalimur hansara og serkønu nevndarlimirnir eru valdir fyri 4 ár í senn og fáa samsýning, ið landsstýrismaðurin ásetir.<br>*Stk. 10.* Føroya Kærustovnur er skrivstova hjá tvingsilsnevndini.<br>*Stk. 11.* Tvingsilsnevndin førir yvirlit yvir avgerðir um góðkenning, móttiknar fráboðanir og frágreiðingar sambært hesi løgtingslóg og greinar og lýsir hesar árliga í ársfrágreiðing. | hesi løgtingslóg og greinar og lýsir hesar árliga í ársfrágreiðing. |
| | **4.** Í § 8, stk. 1, § 9, stk. 1, §§ 10 og 11, § 12, stk. 1, § 13 stk. 1, 2 og 4, §§ 14-16, § 17 stk. 1 og 3, § 18, stk. 1 og 2, § 19, § 20, stk. 1 og 3, § 21, stk. 1, § 22, stk. 1, § 23, stk. 1, § 24, stk. 1-4, § 25, § 26, stk. 1 og 2 og § 30, stk. 2-4 verður "tvingsilsnevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn". |

| | |
|---|---|
| | **5.** Í § 29, stk. 1, § 30, stk. 1, 2. pkt., tvær staðni í stk. 2, stk. 3, 2. pkt. og stk. 4, 2. pkt. verður “tvingsilsnevndin” broytt til: “Føroya Kærustovnur”. |
| **§ 30.** Avgerð, tikin av tvingsilsnevndini sambært hesi løgtingslóg, kann ikki kærast til annan fyrisitingarligan myndugleika, og tað hevur ikki steðgandi virknað, um avgerðin verður løgd fyri Føroya Rætt. Tvingsilsnevndin skal eftir áheitan frá persóninum, advokati hansara ella avvarðandi skjótast gjørligt leggja avgerð, ið nevndin hevur tikið sambært § 10 og §§ 13-20, fyri Føroya Rætt.<br>*Stk. 2-6.* ... | **6.** Í § 30, stk. 1 verður “nevndin” broytt til: “Føroya Kærustovnur”. |
| **§ 50.** Almannaverkið kann leggja tilmæli sambært § 51 fyri tvingsilsnevndina um, at Almannaverkið veitir persóni fyribils bústað sambært § 45 ella vardan bústað sambært § 46, sum eina tryggjaða búfyriskipan.<br>*Stk. 2-4.* ...<br><br>**§ 51.** Almannaverkið leggur tilmæli fyri tvingsilsnevndina um, at Almannaverkið veitir persóni tryggjaða búfyriskipan sambært § 50, tá:<br>1) Almannaverkið sambært dómi ella rættarúrskurði skal veita bústað sambært § 49, stk. 1, nr. 1-3 og § 49, stk. 2,<br>2) Almannaverkið metir, at avgerðin er neyðug til tess at forða fyri, at persónur ger skaða á seg sjálvan ella onnur,<br>3) viðurskiftini í tí einstaka førinum gera tað neyðugt til tess, at persónur kann fáa neyðuga hjálp, stuðul og røkt sambært hesi løgtingslóg, ella<br>4) endamálið ikki kann røkkast við øðrum sosialnámsfrøðiligum tiltøkum.<br>*Stk. 2-8.* ... | **§ 6**<br><br>Í løgtingslóg nr. 72 frá 25. mai 2020 um almannatrygd og tænastur, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verður í § 50, stk. 1 og § 51, stk. 1 “tvingsilsnevndina” broytt til: “Føroya Kærustovn”. |

| | |
|---|---|
| | **§ 7**<br><br>Í løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar: |
| **§ 39.** *Stk. 1-4.* ...<br>*Stk. 5.* Leiðslan á stovninum kann leggja tilmæli um eftirlit og forðan av nýtsluni av interneti og telefon hjá børnum og ungum fyri tvingsilsnevndina sambært ásetingunum í § 17 í løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin.<br>*Stk. 6.* …<br><br>**§ 64 a.** Avgerðir, tiknar sambært § 39, stk. 3, kunnu innan 4 vikur kærast til tvingsilsnevndina sambært § 30, stk. 2 í løgtingslóg um tvingsil og onnur inntriv í sjálvsavgerðarrættin. | **1.** Í § 39, stk. 5 og § 64 a verður "tvingsilsnevndina" broytt til: "Føroya Kærustovn". |
| *Tvingsilsnevndin*<br><br>**§ 64 a.** ... | **2.** Yvirskriftin yvir § 64 a verður orðað soleiðis:<br>"*Tvingsilsmál*" |
| | *Gildiskoma*<br><br>**§ 8**<br><br>*Stk. 1.* §§ 1 og 2 í hesi løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2023.<br>*Stk. 2.* §§ 3 og 4 í hesi løgtingslóg kemur í gildi 1. juli 2023.<br>*Stk. 3.* §§ 5-7 í hesi løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2024. |